UTTANRÍKIS- OG MENTAMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Dagfesting: **30. mai 2021**
Tygara ref.**:**
Máltal.**: 21/08502-2**

Svar

upp á

skrivligan fyrispurning nr. 52-150/2020 frá Anniku Olsen, løgtingskvinnu, um ognirnar í Hoydølum og søla/makaskifti av Venjingarskúlanum, settur Jenis av Rana, landsstýrismanni í uttanríkis- og mentamálum (eftir § 52a í Tingskipanini)

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Eru framvegis samráðingar millum Uttanríkis- og mentamálaráðið og Tórshavnar kommunu um ognirnar í Hoydølum?
2. Um ja, hvat ítøkiliga er ætlanin, at Hoydalar skulu brúkast til?
3. Er landsstýrið áhugað í at keypa tey 40% av Venjingarskúlanum frá kommununi til Fróðskaparsetrið?
4. Um ikki, kundi eitt makaskifti so ístaðin komið upp á tal fyri jørð við Stórutjørn?

Svar

Til 1: Ja, samráðingar eru enn millum Tórshavnar kommunu og Uttanríkis- og mentamálaráðið um ognirnar í Hoydølum.

Til 2: Landsstýrið hevur ikki ítøkiligar ætlanir fyri Hoydalar annað enn tað virksemi, ið er har nú. Hvørjar ætlanir kommunan hevur, er ein spurningur, ið kommunustýrið í Tórshavn má svara.

Til 3: Ja. Ognirnar á Frælsinum hava verið og verða framvegis nýttar til partar av virkseminum hjá Fróðskaparsetri Føroya. Sambært kampusætlanini skal nýtt kampus til Fróðskaparsetur Føroya byggjast á Frælsinum.

Til 4: Tíðliga í tilgongdini var ætlanin at gera eitt makaskifti við kommununa. Ætlanin var tá, at kommunan læt landinum sín part av ognunum á Frælsinum og afturfyri fekk ein part av lendinum við Stórutjørn. Ráðið ráðførdi seg við Búnaðarstovuna, ið umsitur landsjørðina, og har vóru boðini, at eitt tílíkt makaskifti ikki var gjørligt, tí at tað var í stríð við galdandi løgtingslóg um landsjørð. Henda ætlan um makaskifti varð tí slept.

Vinarliga

Jenis av Rana
landsstýrismaður